## Símun í hopla

Nógv varð lagt fyri, tá seinasta venjingin hjá landsliðnum endaði við dysti millum yngru og eldru menninar. Teir ungu vunnu fyri triðju ferð á rað, og tað sluppu teir gomlu eisini at hoyra fyri. Ikki minst var Símun Samuelsen væl upplagdur, og við einum flottum saksasparki skoraði hann einasta málið í dystinum. So er spurningurin bara, um Símun megnar at endurtaka hetta, tá dysturin móti Litava er á skránni í kvøld.



## Bridge FM verður í Havn

Upprunaliga skuldi FM-kappingin fyri lið í bridge spælast í Vági tann 20. september, men tá Smyril fekk tekniskar trupulleikar, varð neyðugt at útseta kappingina. Nevndin í Bridge-sambandinum hevur nú gjørt av, at kappingin í staðin verður flutt til Havnar, har spælt verður leygardagin, 1. november. Byrjað verður klokkan 9.30 hendan dagin. Samstundis er gjørt av, at parakappingin fyri kvinnur verður spæld í Bridgehúsinum tann 25. oktober.

# Christian verður einsamallur

**Talan verður um heldur varisligt útgangsstøði, har stuðulin av miðvøllinum til áleyparan verður altavgerandi fyri álopsspælið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Gulu vestarnir geva sína ábending um, hvussu spælt verður. Her er Jens Martin Knudsen í holt við at geva leiðbeiningar til spælarar*

**Kaunas, Litava:** Jógvan Martin Olsen tóktist longu í gjárkvøldið at hava gjørt av, hvørjir ellivu skulu byrja inni á vøllinum, tá føroyska fótbóltslandsliðið í kvøld fer undir sína seinastu uppgávu á árinum.

Við venjingini á S. Dariaus ir S. Gireno stadion í Kaunas góvu gulu vestarnir eina greiða ábending um, hvørjir teir fyrstu ellivu verða, og hvussu uppstillingin við hesum verður.

### Broytt álopsspæl

Størstu broytingarnar eru at finna frammi á vøllinum. Í málinum er Jákup Mikkelsen sjálvskrivaður, og tað er ikki tann stóra orsøkin til at broyta upp á fýra-ketuna framman fyri hann, har Jónas Tór Næs, Egil á Bø, Jón Rói Jacobsen og Johan Troest Davidsen fara at manna plássini.

Á miðvøllinum verða hinvegin gjørdar fleiri broytingar. Partvíst tí bæði Jákup á Borg og Mikkjal Thomassen nú eru skaddir, og partvíst tí talan eisini verður um varnari spælskipan enn hana, sum vit sóu móti Eysturríki.

Símun Samuelsen, sum tá lág í seingini, kemur inn á kantin vinstrumegin, meðan Christian Høgni Jacobsen verður fluttur yvir í høgru. Mitt fyri er Atli Danielsen einasti maðurin, sum er eftir, meðan Fróði Benjaminsen og Bogi Løkin eisini koma at spæla her. Ivaleyst við tí arbeiðsbýti, at Bogi Løkin er maðurin, sum skal fram at stuðla einsamalla áleyparanum. Og hesin verður sjálvandi Christian Lamhauge Holst.

### Neyðugt við stuðuli

Tá talan bert er um ein áleypara, verður alneyðugt, at hesin fær stuðul frá miðvøllinum. Og tann týdningurin verður eyka stórur, tá talan er um júst Christian Lamhauge Holst.

Fremstu dygdir hansara eru bóltmóttøkan og vendingarnar, tá hann leitar djúpt í vøllin, og so ræður um hjá kantunum ella einum av sentralu miðvallarunum at vera spælbærir í kontrastøðunum.

Tí er tað neyvan heilt av tilvild, at júst Símun, Bogi og Christian Høgni eru teir, sum skulu stuðla. Teir tríggir teljast millum teir mest rennisterku á landsliðnum, og kunnu teir veksla sínamillum, tá stuðulin skal veitast, er als ikki óhugsandi, at vit ígjøgnum dystin síggja fleiri kontrastøður, har føroyingar leypa á við trimum og kanska fýra spælarum.

### Rógvi sum jokari

Enn er ikki vist, hvussu bonkurin fer at síggja út, tí landsliðsvenjarin stendur hesa ferð í teirri støðu, at ein maður skal setast heilt uttanfyri.

Men tað man vera lítil ivi um, at Rógvi Jacobsen verður ein av monnunum, sum kann tveitast inn, um tørvur er á tí. Partvíst gevur tað lítla meining – um hann er tøkur – at hava dragsa mannin heilt til Litava uttan at hava eina ætlan við hesum, og partvíst hevur Rógvi dygdir av slíkum slag, sum liðið illa kann vera fyriuttan. Ikki minst er hann framúr í luftspælinum, og verður talan um tættan dyst, er als ikki óhugsandi, at Rógvi verður sendir á vøllinum seinasta hálva tíman ella so.

## Martin vann og Heini javnleik

**Martin Poulsen vann seinnapartin í gjár lokaluppgerðina ímóti Olaf Berg í 4. umfari í Klaksvík International, meðan Heini Olsen telvdi javnt ímóti IM Esben Lund úr Danmark**

TALV
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*

Eftir soltna umfarið í mánadagin, kom glið aftur á telvingina hjá føroyingum í 4. umfari. Talan gjørdist ikki um nakra stillisliga innanhýsis uppgerð ímillum Martin og Olaf. Báðir telvaðu fyri at vinna og eftir at Martin sýntist koma nakað verri frá byrjanini, broyttist hetta sum fráleið og hegnsisliga vann Martin talvið tá avtornaði.

Heini Olsen kom væl frá byrjanini við hvíta fólkinum ímóti danska altjóða meistaranum Esben Lund. Danin brúkti sera nógva tíð, men telvdi hóast hetta sera neyvt og Heini megnaði sostatt ikki at fáa meiri enn hálva stigið burturúr uppgerðini.

Nakað óvæntað tapti GM Sarunas Sulskis, sum higartil hevur fingið fult stigatal, á IM Tapani Sammalvuo úr Finlandi. Hereftir eru 3 telvarar á odda í kappingini við 3 stigum: T. Sammalvuo, S. Sulskis og R. Åkesson. Martin Poulsen hevur 2 stig og Heini Olsen 1,5.

Í dag verður dupultumfar á skránni, har telvararnir telva bæði klokkan 10 og klokkan 18.

**Úrslitini í 4. umfari:**

- GM G. Jones – FM D. Semcesen **1-0**
- IM T. Sammalvuo – GM S. Sulskis**1-0**
- Martin Poulsen – Olaf Berg **1-0**
- FM Heini Olsen – IM Esben Lund **0,5-0,5**
- GM M. Grabarczyk – GM R. Åkesson **0,5-0,5**

# Avtalað eisini úrslit í Danmark

**Kanadiskur granskari sigur seg vera sannførdan um, at fleiri dystir í donskum fótbólti eru raktir av avtalaðum spæli**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Kanadiski granskarin, Declan Hill, sigur við danskar miðlar, at hann metir tað vera ógvuliga sannlíkt, at dystir í donskum fótbólti verða fixaðir – tað er, tá talan er um avtalað spæl.

Hill hevur skrivað bókina, The Fix, har hann millum annað heldur fast um, at 1/8-finalan millum Brasil og Ghana í seinasta HM-endaspælinum var fixað, og við Danmarks Radio sigur hann, at hetta helst eisini gongur fyri seg í Danmark.

- Havi eg hoyrt slatur um donsk feløg, sum eru blandað upp í avtalað spæl? Avgjørt. Havi eg sæð hagtøl, har serstakliga løgin fyribrigdi fyrikoma í úrslitum, sum veddað verður um? Ja, tað havi eg sæð, sigur hann við DR.

- Eg kann ikki staðfesta, at tað er so, men eg havi hoyrt, at trupulleikin er vaksandi í Danmark, sigur Hill, sum tó ikki vil koma við ítøkiligum dømum úr donskum fótbólti.



*Declan Hill sigur, at trupulleikin við avtalaðum spæli er vaksandi í donskum fótbólti*
*Mynd: Polfoto/AP*